# Globalisering við penum og ljó

**Vit liva í eini verð, sum er globaliserað ella alheimsgjørd, nú meira enn nakrantíð. Løgmaður hevur eina visión, at Føroyar skulu vera millum heimsins fremstu um 10 ár**

BÚSKAPUR
*Rolf Guttesen*
*rg@geogr.ku.dk*



Løgmaður hevði mót til at seta bæði provokerandi spurningar og tekna visiónir á fundi á Hafnia í Havn í síðstu viku. Frágreiðing um útflutning av óvirkaðum fiski vard løgd fram. "Er globalisering ein hóttan ella ein møguleiki? Skulu vit lata samfelagið upp ella lata tað aftur? Hvat sigur vinnan um alheimsgerð, um ES, um einskiljing? Skulu Føroyar í 2015 vera millum heimsins fremstu?" Vandin er nú, at øll siga, at sjálvandi kunnu vit gerast millum heimsins fremstu! So fer herðaklapparíið í gongd. Hvør torir at ganga ímóti hesi innbjóðing?

### Ein globaliseraður føroyingur

Ein globaliseraður føroyingur finst á hvørjum gøtuhorni. Hann gongur í amerikanskum Levi's cowboybuksum, sum eru seymaðar í Thailandi. Gongur í Ecco-skóm, eitt danskt merki sum verður fremleitt í Slovakinum. Hann gongur í leðurjakka, oksaskinnið er úr Argentina men jakkin er seymaður í Malaysia, T-skjúrtan við navninum Mallorca Sun Beach er gjørd í HongKong. Heima spælir hann Bob Marley reggae-musikk á einum Sanyo stereo-annleggi úr Japan, sum er skrúvað saman í Kina. Hann koyrir í einum svenskum SAAB-bili, smíðaður í Trollhättan, men fabrikkina eigur General Motors, sum er amerikanskt firma. Um kvøldarnar sær hann sjónvarp, eitt hollandskt Phillips, sum kemur úr Belgia. Sendingarnar koma um fylgisvein beinleiðis úr Los Angeles ella London. Tað føroyska er í høvdinum.

Soleiðis er gerandisdagurin hjá okkum settur saman sum eitt puslispæl av lutum ú øllum heiminum. Vit liva í eini verð, sum er globaliserað ella alheimsliggjørd, nú meira enn nakrantíð. Hvat er konsekvensurin? Er nakað nýtt í hesum? Hevur tað ikki altíð verið so? Jú, fyri ein part. Sluppirnar komu úr Einglandi, húkarnir úr Týsklandi, knívarnir úr Mora í Svøríki, saltið av Ibiza, og togendarnir kanska frá Randers Reb í Danmark.

### Provokerandi spurningar eru neyðugir

Tí var tað eisini áhugavert at lesa samrøðu við Johan Mortensen í Sosialinum 1.2.05 við yvirskriftini "Um tíggju ár er eingin flakavinna á landi eftir." Hugsanin, sum lá aftanfyri, kann helst kókast niður til ein provokerandi spurning: Kunnu fimm fabrikstrolarar fiska og viðgera tað fiskatilfeingi, sum er undir føroyum - er tað framtíðin? Tað er sunt fyri huglotið, at gera slíkar framskrivingar, fyri at vita eftir hvat konsekvensurin verður. Um vit halda fram á somu gøtu sum nú, hvar enda vit so? Verðin gongur sína gongd, ja - broytist við fúkandi ferð. So í dag er lívsfarligt at siga, at "best man vera sum er."

### Hvat fevnir globalisering um?

Í dag er globaliseringin so nógv meiri umfatandi enn fyrr í tíðini, og fevnir um næstan allar partar av okkara persónliga og samfelagsliga lívi. Formaðurin í danska Búskaparráðnum, Peter Birch Sørensen, sigur soleiðis: "Globalisering kan derfor defineres som den proces, der fører til en mere integreret verdensøkonomi." Hetta ljóðar, sum so nógvar økonomiskar definitiónir, kanska alt ov pent og sakligt, men skeivt er tað ikki. Men, í veruleikanum er eingin "objektiv" definitión uppá globalisering. Hon finst ikki!! Tí tað valdast hvør ið tosar um globalisering. Er tað Bush í Hvíta Húsinum, Eidesgaard í Gráa Húsinum ella ein arbeiðsleys flakakvinna í Vági.

Í stuttum orðingum kunnu hesi økir nevnast sum partar av globaliseringini:

- Globalar fyritøkur og virkir
- Ein globalur handils- og fíggjarmarknaður
- Nýggj ídnaðarlond, NIC- og BRIC-lond
- Teknologisk kollvelting í framleiðslu, samskifti og flutningi
- Minni leiklut til nationalstatin
- Nýggir karmar um mentan og umhvørvi
- Nýggjar politiskar uppgávur á øllum stigum

### Globalar fyritøkur og virkir

Globalisering er einki nýtt, men ummálið er bara vaksið so enormt seinnu tíðina. Verðin hevur eisini fyrr verið nógv meira globaliserað. Tá kapitalisman og ídnaðarkolveltingin tók seg fram í Einglandi fyri 200 árum síðani, seldu fyritøkurnar um allan heim har teir sluppu framat. Einglískmenn royndu at tryggja sær rávørutilførslur og sølumarknaðir við at byggja eitt koloniveldi upp, har teir ráddu fyri borgum. Men uttanlanda handil og framleiðsla í Bretlandi er í dag globaliserað nakað tað sama, sum beint undan fyrra Heimsbardaga, sigur búskaparfrøðingurin Henwood. Mexico hevði størri uttanlandahandil í 1913 enn í dag.

Í 1800-talinum og fram til fyrra Heimsbardaga var handilin millum landa yvirhøvur stórur. Men so kom kríggj og kreppa og ein tíð við protektiónismu, har lond royndu at verja sítt heimliga vinnulív við tollmúrum og innflutningseftirlitð. Aftaná seinna Heimsbardaga fóru lond so smátt at samráðast um at lækka tollmúrar og menna fríhandil.

GATT, General Agreement of Trade and Tarifs, var eitt tiltak, sum skuldi fremja fríari handil. Kol- og Stálunionin millum Frankaríki og Týskland bleiv seinni til 6 lond, sum gingu saman um EF, sum nú er EU við 25 luttakarum. Um tvey ár verða tey helst 27, og um tíggju ár møguliga 30 lond, sum ikki bert hava símamillum fríhandil, men frían arbeiðs- og kapitalmarknað við felags valuta, Euro.

EFTA var eitt fríhandilsøki, sum gamla Stóra Bretland royndi at seta upp sum alternativ til EF. Einglismenn høvdu og hava ilt við at fata, at teir ikki longur "rule the waves." Danmark var limur í EFTA til 1973. Møguliga er tað til enn, men tað hevur ongan praktiskan týdning.

> ” *82% av vørufram-leiðsluni í Verðini fer fram í ríku londunum. 75% av heimshandlinum fer fram millum framkomnu londini*
>
> Sidney Pollard

### Tey multinationalu

Eitt eyðkenni í alheims vinnulívinum hevur í langa tíð verið, at tær størstu fyritøkurnar vóru multinationalar. Tað vil siga at tey høvdu deildir og áhugamál í nógvum ymiskum londum. Stóru oljufeløgini, Esso, Royal Dutch Shell, British Petroleum, Texaco og fleiri eru dømir um multinationalar fyritøkur. Tað nýggja er, at fleiri multinational feløg hava sín uppruna í asiatiskum og latínamerikanskum londum.

Fyrr kundi orðið imperialisma brúkast um eitt menningarstig av kapitalismuni. Orðið hevur kanska mist sína kraft, men innihaldið er nakað tað sama í dag, sum fyrr. Tær geopolitisku treytirnar eru tó øðruvísi í dag. Kapitalisman hevur útrudda tey sonevndu sosialistisku londini, sum - uttan mun til samhug ella hvat - vóru ein geopolitiskur faktorur, ikki einans militert. Í dag kann USA brúka orðini hjá hjá gamla presidentinum Ted Roosewelt: *"Speak softly and carry a big stick"*

### Ein globalur fíggjarmarknaður

Ikki bert er tað framleiðsla og handil sum globaliserast, tað ger kapitalurin eisini. Sjálvandi, kundi man lagt aftrat, tí hetta hongur alt saman. Tá øll tey kapitalistisku londini í 1980-unum avtóku alt, sum forðaði rørsluna, kom rættilig gongd á. Um somu tíð fyri umleið 20 árum síðani var skuldarkreppa í menningarlondunum og tann globali kapitalurin hevði ilt við at finna pláss, har hann kundi investerast skilagott í framleiðslu ella øðrum.

Hetta var eisini tíðin, tá føroyingar læntu stórar upphæddir, ofta við landskassaveðhaldi. Og her henda so tað syrgiliga, at føroyska kapitalisman spældi totalt fallit, og landskassin, skattgjaldarar og samfelagið kom at gjalda fyri hesa gullash-tíð.

Tað at mørkini millum lond opnaðust, ger at kapitalstreymar og spekulatiónskapitalur ferðast frítt. Støddin á kapitali, sum dagliga skiftir hond á valutamarknaðunum, er kanska 100 ferðir størri enn tann sum brúkast til vøruhandil (leksikon.org). Tí er javnan vandi fyri at kapitalmarknaðurin brýtur saman, krasjar, og tjóðbankastjórar og seriøsir valutahandlarar ræðast tað, sum kann henda.

### Nýggj ídnaðarlond, NIC- lond

Einaferð var nógv tosað um u-lond ella menningarlond, og ofta var hugsanin - í 60-unum og 70-unum - at tey vóru og fóru helst altíð at vera tilafturskomin. Men nógv er broytt. Í 80-unum kom eitt nýtt hugtak fram, NIC-lond, newly industrialized countries, ella lond sum nýliga eru vorðin ídnaðarlond. Hesi vóru Korea, Thailand, Taiwan, Malaysia, Singapor og onnur. Hagani komu bíligar vørur, klæðir, skógvar, men seinni eisini bilar, sjónvarp og annar elektronikkur.

### BRIC-londini vaksa skjótt

BRIC er eitt nýyrði, sum er ein stytting av Brasilia, Russland, India, China. Hetta eru størstu londini í 3. heiminum, sum hava ávikavist 190, 150, 1.000 og 1.300 milliónir íbúgvar og haraftrat veldugan ídnað. Búskaparligi vøksturin har hevur verið stórur seinastu árini, og tað kann væntast at hann heldur fram við somu ferð. Gongur sum útlitið er í løtuni verður vøksturin í Bric-londum eini 6%, meðan hann í framkomnu G-7 londunum bert væntast at blíva 3% árliga (Follow the yellow Bric road). Gongur tað soleiðis, so verður framleiðslan í Bric-londum størri enn í G-7 londum um 30 til 40 ár. Henda framskriving sigur nakað um, hvar ið marknaðarvøkstur verður, men eisini nakað um, hvar nýtslan av koli, olju, stáli og øðrum rávørum fer at vaksa, og - hvar dálking og $CO_2$ útlát kann økjast.

### Teknologisk kollvelting í samskifti og flutningi

Nógv fólk hugsa um miss av arbeiðsplássum, tá hugtakið globalisering kemur fyri. Men hetta er bert ein fylgja av einum nýggjum arbeiðsbýti í heiminum. Ein fortreyt er bíligur flutningur, millum annað konteynaraskip, sum skjótt og bíligt kunnu flyta stórar vørumongdir millum heimspartarnar. Stórreiðaríið A.P. Møller, stovnað um somu tíð sum Skipafelagið Føroyar, satsaði strategiskt rætt: Stór og skjóttgangandi konteynaraskip í fastari rutu millum asiatiskar havnir og USA/Europa, sum er ein fortreyt fyri at eitt nýtt TV-apparat kemur næstan líka bíliga úr Japan til Göteborg, sum eitt bræv kemur úr Suðuroy til Havnar.

Í nýggja arbeiðsbýtinum millum lond síggja vit, at eitt nú Kina og onnur láglønarlond, duga at framleiða vørur, sum fyrr at kalla bert vóru framleiddar í sonevndu framkomnu londunum, VesturEuropa og Norðuramerika. Tað eru ikki longur bert bíligar bummullsvørur og plastikskrambul sum kemur hagani. Men eisini vørur á teknologiskt høgum stigi og komponentar, maskinlutir, til víðari framleiðslu koma úr Kina, India ella Malaysia.

Hetta at fyritøkur leggja partar av ella alla framleiðsluna út til láglønarlond, kallast "outsourcing". Men orðið kann eisini merkja, at tey stóru útlicitera framleiðsluna av ymsum komponentum til aðrar fyritøkur, eitt nú í NIC og BRIC-londum, har komponenturin kann gerast bíligari. Eisini føroyska vinnulívið hevur í smáum roynt eitt eitt slag av outsourcing. Eg hugsi um ein skipaskrokk, sum bleiv